## Vinnusíður seinkaðar

**Vegna streymslitið hesa vikuna koma Vinnusíðurnar nakað seinkaðar í blaðið. Vinnusíðurnar eru aftur í blaðnum mikudagin í komandi viku**

# Sigurð í Jákupsstovu á odda fyri føroyskari oljumenning

STARVSETAN

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Sigurð í Jákupsstovu, nú stjóri á samanløgdu Oljufyrisitingini og Jarðfrøðissavninum*

Landsstýrismaðurin í oljumálum Bjarni Djurholm hevur gjørt av at seta Sigurð í Jákupsstovu sum stjóra í Oljufyrisitingini. Hann hevur frammanundan umsitið hetta starvið fyribils. Nýggja starvið fer tó at fevna um bæði Jarðfrøðissavnið og so Oljufyrisitingina, sum áður var Oljumálaráðið. Hesir báðir stovnar eru lagdir saman undir ein stovn.

Nú talan er um ein samanlagdan stovn sigur Bjarni Djurholm við Portalin, at hetta merkir, at tey nú hava avgreitt tað, sum landsstýrið setti sær fyri, tá tað tók við í Tinganesi, nevniliga at samskipa hesar báðar eindirnar. Uppá fyrispurning hvønn týnding henda broyting fær fyri eitt nú oljuleitiing við Føroyar og tey útlendsku oljufeløgini, sum arbeiða her, sigur landsstýrismaðurin, at her verður ikki talan um nakra broyting. – At vit nú hava sett Sigurð í Jákupsstovu sum stjóra merkir, at vit fara at halda fram við tí arbeiði, sum hann hevur gjørt seinastu árini. Hetta er so bara ein sementering av tí veruleika, sum hevur verið. Vit eru nøgd við tað arbeiði, sum Sigurð í Jákupsstovu hevur gjørt sum fyribilsstjóri. Og vit vilja við hesi setan tryggja okkum, at vit hava ein professionellan stovn og leiðslu.

Uppgávan hjá stjóranum í Oljufyrisitingini verður at halda fram við tí arbeiði hann hevur staðið fyri. Her eru tað serstakliga seismiskar kanningar í ár og so helst eina ella tvær royndarboringar næsta ár. Oljufyrisitingin hevur í eina tíð verið í samráðingum við oljufeløgini um at flyta brunnar frá 1. útbjóðing til onnur loyvi. Síðani er nógv virksemi í bretskum øki nær føroyska markinum, og her er tað ein týðandi uppgáva at fylgja væl við, hvat hendir.

Privatiseringar nærkast – men:

# Má ikki enda við privatum monopoli

**Landsstýrið er um at vera liðugt við at orða ein nýggjan vinnupolitikk. M.a. fer ein kappingarlóg at vera løgd fyri løgtingið, sum skal forða fyri, at vit ikki enda í eini privatmonopollíknandi støðu, tá privatiseringar verða framdar. Partur av vinnupolitikkinum fer at verða avdúkaður í løgmansrøðuni á ólavsøku sigur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm**



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður heldur alingin er við at fóta sær aftur*

VINNUPOLITIKKUR OG PRIVATISERING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað gongur ikki dagur, at vit ikki hoyra um, at íslendingar hava keypt upp stór feløg í útheiminum. Sum tað seinasta hava teir keypt danska Mærsk Air. Vit spurdu Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, um hann sær fyri sær tann møguleikan, at tað vera íslendingar, sum kanska fara at keypa upp meginpartin av føroyskum vinnulívi, tá tær umrøddu privatiseringarnar gerast veruleiki?

- Tað er eingin ivi um soleiðis sum gongdin er í dag og soleiðis sum íslendingar vísa áhuga fyri Føroyum, at teir verða millum framtíðar aktørarnar her í Føroyum eisini, men hvussu nógv teir fara at keypa veit eg ikki. Tað, sum er umráðandi fyri okkum, er, at tá feløg verða keypt ella seld, at vit hava kappingarreglar, soleiðis at vit ikki enda í eini monopolstøðu. Eg vil gera alt fyri at sleppa undan sum landsstýrismaður, at vit fara frá einum almennum monopoli til eitt privat monopol. Tað er umráðandi uttan mun til, hvør eigur, um tað eru íslendingar ella aðrir, at vit hava reglur, sum tryggja okkum, at vit ikki fáa eina monopolstøðu í Føroyum innan fyri ávísar vinnur. Til tess at forða fyri, tá privatiseringarnar byrja, at vit ikki koma at enda í eini privatmonopollíknandi støðu arbeiðir landsstýrið í løtuni við at leggja eina nýggja kappingarlóg fyri løgtingið.

Landsstýrismaðurin leggur aftrat, at tað er líka mikið, hvør eigur hvat. Bara tað virksemi, sum er, í so stóran mun verður rikið her úr Føroyum, at man frígevur kapital, sum kann vera við til at stovna nýtt virksemi.

- Íslendingar keypa fleiri flogfeløg, td. Sterling og Mærsk, er tað ikki náttúrligt at halda, at teir eisini fara at keypa Atlantsflog.

- Tað er eingin ivi um, at íslendingar vera millum tey, sum hava áhuga. Men tað eru kanska onnur, sum hava áhuga fyri Atlantsflog enn íslendingar, so tað verður spennandi at síggja, hvør fer at keypa.

Bjarni Djurholm skuldi vera við í London herfyri,tá ein stór sendinevnd úr Føroyum fór at kunna seg við fíggingarmarknaðir har og fáa samband við fíggingarstovnar í Bretlandi. Hann var tá í USA í ørindum og harmast um, at høvi ikki var at vera við í Bretlandi.

- Tað átakið, sum landsstýrið tók stig til at gera í London, var sera positivt. Tað er sera umráðandi fyri okkum, tá vit fara at selja út av føroyskum aktivum, at vit hava so nógvar áhugaðar, sum til ber og at vit fáa kapping um tað vit skulu selja. Bjarni Djurholm leggur aftrat, at tað er týdningarmikið fyri okkum, at vit fáa seriøsar keyparar. Tess breiðari keyparaskara tú hevur, tess betur møguleika hevur tú fyri sum seljari at velja tann burtur úr, sum best passar inn eitt konsept.

- Vit selja ikki bara yvir háls og herðar. Vit koma helst at selja við nøkrum restriktiónum, soleiðis at vit tryggja føroysk áhugamál, so langt tað røkkur. Soleiðis at tú hevur ein ávísan tryggleika bæði frá tí politisku skipanini og millum tey, sum starvast og virka dagliga í feløgunum. Tað hevur nógv at siga fyri meg.

### Framtíðin hjá vinnuni

Nógv myrk skíggj eru á luftini. Hvussu sær landsstýrismaðurin í vinnumálum framtíðina hjá vinnuni!

- Vit hava jú í dag (fríggjadag, blaðm.) lagt síðstu hond á ein nýggjan vinnupolitikk, sum vit fara at leggja fyri løgtingið í august. Og vit fara at avdúka ein part av honum í sambandi við løgmansrøðuna. Har hava vit valt at síggja verðina frá einum kanska øðrum sjónarhorni, enn vit síggja tað til dagligt. Og vónandi kann tað vera við til at lata upp fyri

